Hvítusunnumøtir

KARISMA

STÓR BÓKASØLA Í HØLLINI!

Dánjal á Dul Jacobsen

Tummas Jacobsen

Pauli Høj

Fríðtór Debes

Jón Miðberg

Símun Jacobsen

UNGDÓMSTILTØK

Leygarkvøldið 7. juni kl 22 verður spennandi tiltak fyri tey ungu og onnur, sum kenna seg ung, kallað Youth Arise: Sangbólkur, dansibólkur, dramabólkur, lovsongsbólkur o.fl. luttaka við fjølbroyttari skrá.

1. Hvítusunnukvøld kl 22 verður lovsongskonsert í samband við útgávu av nýggjari lovsongsfløgu. Á hesari konsertini luttaka kendir føroyskir solistar saman við United Voices – men við donskum tónleikarum. Fløgan er áður komin út á donskum.



BØRNINI
Tiltøkini fyri børnini verða leygarkvøld, 1. og 2. hvítusunnudag. Byrjað verður í ítróttarhøllini og síðani verður farið yvir í Rhema.

Fríggjakvøld:

Syngið-við-kvøld	kl. 20.30

Leygarkvøld:

Evangeliskt møti	kl. 19.00
Youth Arise ungdómstiltak	kl. 22.00

1. hvítusunnudag:

Møti	kl. 11.00
Evangeliskt møti	kl. 18.00
Lovsongskonsert	kl. 22.00

2. hvítusunnudag:

Møti	kl. 11.00
Evangeliskt møti	kl. 17.00

Í ÍTRÓTTARHØLLINI
á Hálsi

Hús í Trongisvági

Um hóskandi boð fæst, verða sethús í Trongisvági lýst til sølu.

Grundøkið er 1045 m² til søddar.

Húsini eru í tveimum hæddum. Í miðhæddini er durur, gangur, baðiverilsi, kamar, stór stova og køkur – alt gjørt av nýggjum.
Í kjallaranum eru wc, baðiverilsi, gangur, trý kømur og fýrrúm.
Húsini liggja væl fyri, og hava stórt parkeringspláss.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til:

Advokatskrivstovuna
Fr. Petersensgøtu 9 · Tórshavn
Halgir Winther Poulsen , adv.
Magnus S. Petersen, adv.
Fríða Patursson, adv.
Ólavur Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Tlf. 31 11 45

Suðuroyar Ellis- & Røktarheim
800 Tvøroyri

Sjúkrarøktarfrøðingur

Eitt starv sum sjúkrarøktarfrøðingur við einari arbeiðstíð uppá 0,5 í skiftandi vaktum er leyst til setan frá 1. juli 2003.

Løn og setanartreytir sambært sáttmála millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

Nærri upplýsingar viðvíkjandi starvinum fáast við at venda sær til fyristøðukvinnuna, tlf. 371666 lok. 147.

Umsóknir við avriti av prógvum v.m. skulu sendast til:

Suðuroyar Ellis- & Røktarheim
att. Fyristøðukvinnan
Postrúm 51
800 Tvøroyri

Umsóknarfreist 19. juni 2003.

Sosialurin
www.sosialurin.fo

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. P/F 3222, P/F DONG Føroyar, 100 Tórshavn.
Nevnd:
Farin úr nevndini: Anders Eldrup, C.F. Richs Vej 58, DK-2000 Frederiksberg (formaður), Hans Jørgen Kruuse Rasmussen, Krokusvej 10, DK-2970 Hørsholm og Peter Skak-Iversen, Hovmosevej 12, Gadevang, DK-3400 Hillerød.
Innkomin sum formaður: Søren Gath Hansen, Avnsøvej 3, DK-2820 Gentofte.
Innkomin í nevndina: Per Mørch Sørensen, Tunet 9, DK-3450 Allerød (næstformaður), Jan Terje Edvardsen, Kvædevej 61, DK-2830 Virum, Mads Peter Arndal-Lauritzen, Skovvej 21, DK-2950 Vedbæk og Jens Anders Mørland, Vikedalsgate 35, N-4012 Stavanger.
Stjórn:
Farin frá sum stjóri: Søren Gath Hansen, Avnsøvej 3, DK-2820 Gentofte.
Innkomin sum stjóri: Mads Peter Arndal-Lauritzen, Skovvej 21, DK-2950 Vedbæk.

Skráseting Føroya tann 30. mai 2003
Kristin Balle

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. Sp/f 2574, Sp/f Bil Mini-Taxa 96, 100 Tórshavn.
Nevnd:
Farin úr nevndini: Gorm Símunarson Simonsen, Frælsið 18, 100 Tórshavn (formaður) og Axel Andreas í Skorastovu, Tjarnarlág 6, 100 Tórshavn.
Innkomin í nevndina: Andreas Gærdum Johansen, Gundadalsvegur 11 kj., 100 Tórshavn (næstformaður) og Karlon Rovi Winther, Velbastaðvegur 48, 100 Tórshavn.
Stjórn:
Farin frá sum stjóri: Axel Andreas í Skorastovu, Tjarnarlág 6, 100 Tórshavn.
Innkomin sum stjóri: Ingálvur Midjord Kjærbo, Eysturstræti 21, 100 Tórshavn.

Skráseting Føroya tann 30. mai 2003
Kristin Balle

Lesið Sosialin

HEILSANIR

Hey Ása – góða dóttir og systir
Hjartaliga tillukku á 6 ára degnum 4. juni. Jesus signi framtíð tína.
Heilsan mamma, babba, Súni, Sonny og Mary

Joselyn Andreasen – góða mamma
Hjartaliga tillukku við 70 ára degnum. Takk fyri alt.
Ynskir Oddmar

Góða Eyðbritt
Hjartaliga tillukku á 8 ára føðingardegnum, tað verður spennandi tá ið tit koma suður aftur.
Kærar heilsanir omman, abbin og pixi

Góða Eyðbritt
Hjartaliga tillukku við 8 ára degnum í dag, gleði meg til tit koma suður aftur.
Heilsan Bartal

Bilførari

Vit sóknast eftir einum bilførara við stórum koyrikorti og kranaloyvi at byrja sum skjótast.

Starvið sum bilførari fevnir um útkoyring av byggitilfari í samráð við goymsluformann okkara.

Trukkloyvi gevur fyrimun, men er ikki ein treyt.

Vit vænta at tú:
- ert nærlagdur og røkin
- vísir vilja at samstarva við onnur

Hevur tú áhuga í hesum starvi og kanst liva upp til omanfyri nevndu eginleikar, kanst tú senda okkum eina umsókn.

Umsóknin skal sendast til:
Timburhandilin
att.: Jan á Argjum
Postmoga 3038
110 Tórshavn

Hevur tú spurningar, kanst tú seta teg í samband við Jan á Argjum á tlf. 31 12 50

TIMBURHANDILIN

Verkfallið kostar hjá øllum

Fólk í verkfalli missa 247,8 kr. um dagin, meðan verfall er
Tilvildarlig mynd

Vit hava hugt eitt sindur eftir, hvør missurin og kanska vinningurin av verkfallinum er

VERKFALL
Heri á Rógvi

Verkfallið hevur nú vart síðani 8. mai. Hetta eru smáar fýra vikur. Roknað vit frá arbeiðsdagar frá 9. mail til og við 4. juni, gevur hetta seytjan arbeiðsdagar.

Fyri hesa tíðina fáa fólk í verkfalli løn frá verkfalsgrunnum. Hesin peningur hava limirnir sjálvir goldið inn, men skulu nú gjalda skatt, tá hann kemur útaftur.

Ein arbeiðari hevur sum grundløn 92,2 kr. um tíman. Afturat hesum kunnu koma ymsar viðbøtur, t.e. fyri skitið arbeiði ella okkurt serstakt arbeiði. Afturat tímalønini ein lønmóttakari frítíðarløn, sum er tólv prosent afturat grundlønini. Harumframt verður sum er latið 3,6% í eftirlønargjaldið. Sostatt er samlaða útgjaldið fyri ein vanligan arbeiðstíma hjá arbeiðsgevaranum 106, 58 kr.

Meðan verkfall fáa fólk vanliga 70% av lønini í verkfallspengum, um hesi gera sínar skyldur við at standa vakt og annað.

Siga vit, at eftirlønargjald eisini verður goldið av verkfalsgrunni, so er virðið á hvørjum tíma nú 74,61 kr. ella 32 kr. minni enn í síðsta sáttmálaskeiðin-um.

Missurin um dagin 255,8 kr. – um vikuna 1.279 kr.

Missurin pr. 4. juni hevur verið sosatt verið 4.348 kr. samanlagt.

Verður ikk roknað við eftirlønargjaldinum, so er tapið 247, 8 kr. um dagin og 4.213 kr. samanlagt.

Men so er spurningurin, um verkfallið loysir seg. Fólk halda flest øll upp á, at tað ikki ber til at rokna hetta beinleiðis, og tað er ivaleyst eisini nakað um prátið.

Nýta vit tríggjar krónur afturat tímalønini og eitt prosent afturat eftirlønini sum útgangspunkt,. so vísir tað seg, at verkfall á ein hátt loysir seg. Við seytjan sum útgangspunkt, so gevur ein tílíkur sáttmáli 9.128 kr. meira í enn tann undanfarni, tá verkfallspengarnir eru drignir frá. Íroknað verkfallspengar gevur tað einar 19.000 kr. meira, og hetta er væl meira enn tær fýratúsund, sum eru mistar við verkfallinum í mun til gamla sáttmálan.

Men uppgerðin skal takast við fyrivarni, tí ein nýggjur sáttmáli merkir eitt nú eitt nýtt útgangspunkt.

100 milliónir

Eitt annað áhugavert útfrá hesum tølunum er, hvussu nógv verkfallsgrunnarnir hava verið noyddir at goldið í verkfallinum.

Ingeborg Vinther sigur, at um 11-12.000 fólk eru í verkfalli. Roknað vit við 11.000 fólkum, so hevur verkfallið kostað grunnunum 108 mió. kr., tá roknað verður uttan eftirlønargjald.

Tað er so heldur ikki vist, at øll fáa júst hetta 70%, men í øllum førum kostar ein »vanligur« persónur í verkfalli verkfallsgrunnunum. 578,28 kr. um dagin í besta føri.

HAVNAR BIO
Tlf. 31 19 56
www.bio.fo



Mikudagin	04.06.	kl. 18³⁰
Mikudagin	04.06.	kl. 22⁴⁵
Hósdagin	05.06.	kl. 18³⁰
Hósdagin	05.06.	kl. 22⁴⁵



Mikudagin	04.06.	kl. 20¹⁵
Hósdagin	05.06.	kl. 20¹⁵



Mikudagin	04.06.	kl. 22⁰⁰
Hósdagin	05.06.	kl. 22⁰⁰



Mikudagin	04.06.	kl. 19³⁰
Hósdagin	05.06.	kl. 19³⁰

KOMANDI FILMUR

Frumsýning
Fríggjadagin 06.06.

Stórt úrval av DVD-filmum til sølu